Starv

# Starvsfólk til rutuupplýsingina

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir starvsfólki til rutuupplýsingina á Farstøðini í Tórshavn.

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávur hjá tí, ið sett/ur verður**
Uppgávur hjá starvsfólkinum verða m.a. at taka sær av:
- Kundaavgreiðslu í rutuupplýsingini
- Telefonavgreiðslu í rutuupplýsingini, herundir upplýsing um ferðaætlanina og ferðaseðlaprísir
- Fyrifallandi umsitingarligt arbeiði.

**Førleikakrøv**
- Góðan tænastuhugburð
- Góð samstarvsevni
- Góð evni at orða seg munnliga á føroyskum, norðurlendskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Abeiðstíðin er aðru hvørja viku, gerandisdagar kl. 16.30–23.00, í vikuskiftinum kl. 7.00–14.00 og kl. 17.00–23.00.
Starvið verður sett og lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið

**Umsóknir**
Umsókn skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2002.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Regin Vágadal, á tlf. 343000 ella á e-post: rev@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

HÚSASØLAN

# Sethús í vesturbýnum til sølu

Stór sethús í Skrivaragøtu 3 verða hervið lýst til sølu.



**Grundøki** er 450m² til víddar við stórum parkeringsøki.

Húsini eru bygd í 1974 og hava fýra hæddir.

**Ovasta hæddin**, sum er innrættað í 1987, er ein stór stova, sum er 65m² til víddar, við panorama útsýni, skráveggjum, beisaðum bjálkum og lútaðum gólvi.

Hinar tríggjarhæddirnar eru 122m2 hvør og eru innrættaðar soleiðis:

**Niðasta hædd:** Stova, køkur, kamar, baðirúm (brúsa, toilett og hondvask) handilshøli og fýrrúm

**Miðhæddin:** Stórur spísikøkur við avbera góðum útsýni, spísistova, dagligstova, sovikamar, kamar, gong, vindfang, bryggers, brúsubað, toilett við hondvask og hjallur.

**Loftið:** Køkur, stórur kvistur við heilum veggi við skápum við palisanderhurðum, trý onnur stór kømur, nýtt baðirúm við hvítum flísum og hita í gólvinum (baðikar, brúsa, wc, bidé og hondvask).

Altan er á vestursíðini.

Trappan uttandura er løgd við flísum.

Húsini eru egnað til einhvønn stovn, t.d. barnagarð ella vøggustovu, ella sum vanlig sethús.

Húsini kunnu síggjast við at avtala tíð hjá undirritaðu.

dp

**Heygum & Petersen**
**advokatar**
Bjørn á Heygum Alfred Petersen
Bøgøta 16, Postsmoga 164, FO-110 Tórshavn
Telefon: 311710, Telefax: 311757,
E-mail: adv-hp@post.olivant.fo

TRYGD OG SERKUNNLEIKI TRYGD OG SERKUNNLEIKI




2002
# Páskastevnan
í Ítróttarhøllini á Hálsi
28. mars - 1. apríl

Páskastevnan 2002

**Skírhósdagur** - 28. mars
kl. 19 Møti við Gordon

**Langi fríggjadagur** - 29. mars
kl. 10 Morgunmøti við Ole Henry
kl. 15 Møti við Gordon
kl. 19 Møti við Ole Henry

**Leygardagur** - 30. mars
kl. 19 Møti við Gordon
kl. 22 Lovsongskvøld við lovsongsbólkinum úr Hoyvík

**Páskadagur** - 31. mars
kl. 10 Morgunmøti við kvinnum
kl. 15 Familjumøti
kl. 19 Møti við Ole Henry
kl. 22 Gospeltiltak við ymiskum luttakarum

**2. páskadagur** - 1. apríl
kl. 10 Morgunmøti við monnum
kl. 18 Møti við Gordon



Gordon Hickson



Ole Henry Halleraker

Meinigheitin í Hoyvík

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin -tað loysir seg


28/03/2002
blað nr. 61

# Mótasíðan

## Fjøltáttað handilslív í gomlu bommfabrikkini

Húsini, sum flest øll havnafólk, kenna sum gomlu bommfabrikkina, eru nú vorðin til ein handilsbygning við ríkum og fjølbroyttum úrvali. Í hesum bygningi halda í løtuni Frú S, PAU og Drós til

HANDILSLÍV
Ingrid Bjarnastein

PAU er eitt føroyskt vørumerki, sum tær báðar Dania Danielsen og Anna Mortensen standa aftanfyri. Tær hava verið í hesi vinnuni í samfull trý ár, og hava tær hildið til í Dr. Jakobsensgøtu síðani desember mánaða í fjør.
– Tað tekur sera langa tíð at koma rættiliga í gongd, greiðir Dania frá.
– Vit hava verið í gongd í fleiri ár, men ikki fyrr enn fyri nøkrum fáum mánaðum síðani hava vit fingið hølir her í havnagøtum, og mugu vit sigast, at vera rættiliga hepnar.
PAU hevur nógvar vørubíleggingar. Millum annað verður seymað til útisetakórið Mpiri, hjá Sunnleivi Rasmussen í Keypmannahavn, og henda vegin hava tær eisini fingið nógvar aðrar bíleggingar.
– Men fyri nú, so hava vit lagt uttanlandshandilin á hillina, sigur Dania.
– Eftirspurningurin er so stórur í Føroyum, at vit hava valt at nøkta henda tørvin fyrst og fremst, men vit ætla uttan iva at taka virksemið í útlandinum uppaftur.
Stílurin PAU leggur seg eftir er tað altjóða sniðið. Hildið verður ikki beinleiðis fast um tað gamla – tað at ein troyggja skal síggja út soleiðis ella soleiðis. Nýmótans føroysk klæðir, virkað úr føroyskari ull, sum sita væl á kroppinum. PAU hevur havt nógv úrval til kvinnur, ung og børn, og nú eru menninir eisini slopnir upp í part.
– Vit hava ikki havt nakað serligt til menninar, men nú hava vit fingið okkurt til teirra eisini, sigur Dania Danielsen.







## Ein øðrvísi gávubúð

Frú S byrjaði í einum lítlum kjallara í Jónas Broncks gøtu. Kjallarin var ikki meira enn eini 18 m² til støddar. Tí helt Susan Stakksund, at tørvurin fyri plássi var ikki so stórur, men nú vísir tað seg, at Frú S verður noydd at víðka um gólvvíddina í handlinum. Frú S fyllir trý tann 28. apríl, og tað handilin leggur seg eftir er tann trendstílurin, sum er í dag. Litirnir eru ljósir og léttir, og gávulutirnir tú fært hjá Frú S, eru ikki sovorðnir tú sært allastaðni. Innbúgv, møblar, brúksting, barnaklæðir, meturvøra eru bara eitt lítið brot úr lutunum, ið verða seldir inni í gávubúðini í Dr. Jakobsens gøtu. Barnaklæðini, ið seld verða, eru av vælumtókta danska merkinum, Okker Gokker.
– Eg fari at fáa meira møblar, tí tað vísir seg at vera tað, sum fólk eru ógvuliga áhuga í, greiðir Susan Stakksund frá. – Handilin fær nýtt inn allatíðina, og tað ger, at hann hongur ikki í tí sama leingi.
Hugnaligu hølini í Dr. Jakobsens gøtu síggja ikki rættiliga út sum ein handil. Har eru fleiri 1000 ting inni, sum øll hava sín serstaka dám.
Frú S og PAU noyðast nú at víðka um virksemið. Susan hevur tørv á meira plássi, og tað hevur við sær, at PAU fær hølini við síðuna av, ístaðin fyri bakhølini hjá Frú S. Soleiðis fær PAU eisini sín egna sýnisglugga. Tær báðar, sum halda til í gomlu bommfabrikkini, lata serstakliga væl at. Sølan gongur væl, og tær eru fegnar um, at kunna vera við í einum nútímans og altjóða høpi.





termokannur: 159,- stk



glasamplir: 79,- stk